# Fundur við starvsfólk á gistingarhúsum og matstovum



*Í løtuni eru flest øll sum starvast innan gistinaghús og matstovuvinnuna uttan sáttmála*

Fróði Løkságarð

Mikudagin var fundur millum Føroya Arbeiðarafelag og starvsfólk á gistingarhúsum og matstovum. Á fundinum var tosað um møguleikan fyri at fáa hesi starvsfólkini innlimaði í Føroya Arbeiðarafelag, og harvið eisini fáa teirra sáttmálaviðurskifti uppá pláss.

**Øll hava krav uppá ein sáttmála**

Í løtuni er hesin starvsbólkur uttan nakað fakfelag. Eftir hvat skilst eru tað nøkur fólk innan hesa vinnuna, sum hava heitt á Føroya Arbeiðarafelag um at gerast limir, soleiðis at tey koma at arbeiða undir sáttmála. Ingeborg Winther forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag heldur tíðin er komin til at fáa viðurskiftini hjá hesum starvsfólkum í rættlag. -Vit skriva ár tveytúsund nú, so tað er minsta krav, hjá einum hvørjum tímaløntum at vera limur í einum fakfelag og arbeiða undir einum sáttmála.

Ingeborg Winther vil vera við at tað fyrst og fremst eru leiðslurnar fyri tey stóru gistingarhúsini og matstovurnar sum liggja í buktini. Sum er nú er tað bara tað eina gistingarhúsið í landinum sum hevur sáttmála við síni starvsfólk, og tað er Hotel Vágar. Hesin sáttmáli er meiri enn 10 ára gamal.

**Hotel Vágar er undantakið**

Sáttmálin kom í lag eftir at flogvøllurin lá lamin av verkfalli og somuleiðis Hotel Vágar. Flogfelag Føroya noyddist upp í Føroya Arbeiðsgevarafelag fyri at fáa loyst trætuna. Av tí at Flogfelag Føroya eisini eigur Hotel Vágar, so fylgdi hetta eisini við, og starvsfólkini gjørdist limur í Føroya Arbeiðarafelag. Stjórin á Hotel Vágum Uni Danielsen, sum eisini er fyrrverandi formaður í Gistingarhúsfelagnum, sigur at so vítt hann veit, eru starvsfólkini á Hotel Vágum vælnøgd við henda sáttmála Sáttmálin, sum er ein sersáttmáli millum Hotel Vágar og Føroya Arbeiðarafelag, er í høvuðsheitum tann sami, sum sáttmálin millum Føroya Arbeiðarafelag og arbeiðsgevarafelagið, umframat ymiskar viðbøtur.

Av tí tað at tað ikki eru øll starvsfólkini sum standa saman um ynski at blíva innlimaði í fakfelag, verður ført fram, at summi av teimum føla seg hótt av sínum arbeiðsgevara, og eru bangin fyri at vera søgd úr starvi, um tey fara at seta fram krøv um sáttmála og harvið helst eisini hægri løn. Hetta vísur Johan Restorff, stjóri á Hotel Hafnia, aftur uppá tað sterkasta, hann sigur at teir hava aldrin sett fram hóttanir móti fólki sum hava ynkst at blivið organiseraði.

**Tíð uppá at politikararnir vakna**

Ingeborg Winther heldur eisini at tað er tíð uppá at poltitikararnir sum siga seg varða av teimum tímaløntu vakna. -Hesir menn ganga mangan út á matstovur í samband við sítt arbeiði. Teir áttu at hugsa seg um, og boykotta hesi støð, til rættindini hjá arbeiðsfólkunum vóru fingin í rættlag, sigur Ingeborg sum ger vart við at hetta er hennara persónliga áheitan

**Gistringarhúsfelagið eitt áhugafelag**

Aðalfundur var í Gistingarhúsfelagnum fyri viku síðani, har partar av nevndini stóðu fyri vali. Formaðurin, Uni Danielsen, ynksti ikki afturval. Enn hevur nýggja nevndin ikki skipa seg, men fundur um hetta, verður fyrst í komandi viku, og tá verður málið um møguligar sáttmálar viðgjørt. Sum nú er, er Gistingarhúsfelagið bara eitt áhugafelag, og hevur einki við sáttmálasamráðingar at gera.

Johan Restorff, nevndarlimur, sigur tó, at málið um sáttmálar er úti hjá teimum einstøku limunum til umrøðu. Johan Restorff sigur víðari at skal sáttmáli gerast fyri starvsfólk innan gistingarhús og matstovuvinnuna, so er umráðandi at hann umfatar øll, eisini tey støð har veitslur og onnur líknandi tiltøk vera hildin, og ikki bara nakrar fáar matstovur og gistingarhús. Væntandi fæst meiri at vita um hetta mál tá nevndarfundur hevur verið í Gistingarhúsfelagnum í komandi viku.


# Søkt verður eftir fólki til Vinnumálastýrið

## 2 projektfulltrúar til ES-verkætlan

**Uppgávur:**

Høvuðsuppgávurnar verða at laga føroyska lóggávu á veterinera og heilsufrøðiliga økinum til ES reglur.

**Krøv:**

Vit hava hugsað okkum, at tú hevur løgfrøðiligt embætisprógv ella líknandi útbúgving.
Tú skalt eisini duga væl føroyskt og enskt, duga at arbeiða sjálvstøðugt og hava góðan kunnleika til edv.
Fólk, sum eru um at vera liðug við útbúgving sína, eru vælkomin at søkja.

**Setanartreytir:**

Setanarviðurskiftini eru sáttmáli millum Fíggjarmálastýrið og Búskapar- og løgfrøðingarfelagið.
Setanarskeiðið eru tíðaravmarkað til 31. desember 2000, tó so at talan kann verða um fast starv eftir hetta.

Viðmerkjast skal, at setanin umfatar Vinnumálastýrið og stovnar undir tí, umframt løgmansskrivstovuna og onnur aðalstýri.

**Umsóknir:**

Vit skulu hava fingið umsóknina í seinasta lagi kl. 12.00 tann 9. juni 2000.
Størvini verða sett skjótast tilber.

## Skrivari

***Vegna barnsburð verður søkt eftir skrivstovufólki til Vinnumálastýrið.***

**Uppgávur:**

- Journal og postavgreiðsla
- Ymisk møalsavgreiðsla
- Aðrar fyrifallandi skrivstovuuppgávur

**Krøv:**

Vit hava hugsað okkum, at tú hevur skrivstovuútbúgving ella líknandi førleika.
Hollan kunnleika til skrivligt føroyskt. Kunnleika til EDV á brúkarastøði og góð samstarvsevni.

**Setanartreytir:**

Setanarviðurskiftini eru sáttmáli millum Fíggjarmálastýrið og starvsmannafelagið.

**Umsóknir:**

Vit skulu hava fingið umsóknina í seinasta lagi kl. 12.00 tann 16. juni 2000.
Starvið verður sett uml. hálvan juli ella fyrst í august og 6 mánaðir fram.

**Umsóknir skulu sendast til:**

Vinnumálastýrið
Postboks 377
FO-110 Tórshavn

Vilt tú hava meira at vita um størvini, kanst tú ringja til Bjarna Askham Bjarnason, deildarstjóra, tel 35 60 60.

team 85 • 31 65 11

VINNUMÁLASTÝRIÐ






*Havnarútbyggingin í Havn gjørdist munandi bíligari enn væntað, og hetta lættir munandi um fíggjarstøðuna*
Mynd: Jens Kristian Vang

# Tórshavnar Havn hækkandi inntøkur

*VØKSTUR. Ein inntøka á slakar 30 milliónir í fjør hevur við sær, at Tórshavnar Havn verður betri før fyri at fremja íløgur í framtíðini*

Høgni Mohr

Tórskvøldið varð roknskapurin hjá Tórshavnar Havn fyri 1999 lagdur fyri býráðslimirnar í høvuðsstaðnum. Bæði nevndarlimirnir í havnarnevndini við Tórfinni Smith á odda og býráðslimirnir annars hava orsøk at vera nøgdir.

Inntøkurnar í fjør hækkaðu umleið 10 prosent í mun til árið fyri.

Seinastu trý árini hava inntøkurnar hjá Tórshavnar Havn verið hesar:

1997 - 24,7 milliónir
1998 - 26,6 milliónir
1999 - 29,3 milliónir

**Fleiri vørugjøld**

Á leið helvtin av inntøkunum er vørugjald. Annar stórur partur er havnar- og brúgvargjald, sum skip og bátar rinda, og triðja stóra inntøkukeldan er leigugjald fyri bygningar og havnarøki, ið er einar 6 milliónir.

Ymiskar orsøkir eru til stóra inntøkuvøksturin. Greitt er kortini, at vørugjaldið, sum er álítandi barometur fyri búskaparstøðið landsins, er hækkað mest. Serliga tí innflutningurin er vaksin munandi seinastu tíðina.

**Bílig útbygging**

Fastar og leysar rakstrarútreiðslur hjá Tórshavnar Havn vóru í fjør o.u. 10 milliónir. Sløku 20 milliónirnar, ið lógu eftir, verða í høvuðsheitum brúktar til ta stóru molabreiðkanina.

Hetta arbeiðið verður munandi bíligari at gera, enn hildið varð tá ið tað varð boðið út. Kostnaðurin varð mettur til einar 60 milliónir, men tá ið tilboðini vórðu latin upp, vóru øll betur enn væntað. Staðfest varð, at arbeiðið »bert« fer at kosta góðar 40 milliónir.

**Avlop til havnina**

Tá ið tað gongur væl fíggjarliga hjá Tórshavnar Havn, er tað bert havnin (ikki Havnin), ið fær beinleiðis ágóðan av møguligum avlopi. Peningur verður ikki fluttur til onnur kommunal øki.

Í havnarnevndini verður hildið, at um útbyggingarnar vóru at enda komnar, so hevði tað kanska fløtt í havnarkassanum. Men neyðugt er eftir øllum at døma at fremja framhaldandi útbyggingar og umvælingar, tí tørvurin á atløgupláss og havnarøki vekstur og broytist so hvørt. Neyðugt er at hava pláss til skip og serliga bingjur, ið eru vornar fleiri í tali.

**Byggja í Nýhavnini**

Havnanevndin arbeiðir í løtuni við at skipa økið á keiini av nýggjum. Greitt er, at nýggi molin verður bingjupláss burturav. Hetta gevur frípláss á tí innaru, sonevndu Nýhavnini, har bingjurnar nú standa. Íslendska Eimskip er eitt av flutningsfeløgunum, ið kanska fer at byggja sær farmagoymslu á tí økinum

Ongar aðrar ítøkiligar ella alment kendar ætlanir eru í løtuni um størri út- ella umbyggingar á økinum hjá Tórshavnar Havn.

# Oljan til Havnar

*OLJUKAPPINGIN. Størri tænastuútboð í Tórshavn hevur sambært Tórfinn Smith við sær, at oljufeløg av sær sjálvum fara at vera áhugað í at vera so tætt høvuðsstaðnum, sum gjørligt*

Høgni Mohr

Tórfinn Smith, formaður í havnarnevndini í Tórshavn, er ikki í iva. Oljufeløgini fara av egnum áhuga at leita sær til Havnar. Orsøkina heldur hann vera, at høvuðsstaðurin hevur nógv mest at bjóða á tænastuøkinum.

- Okkar styrki fram um aðrar er, at samlaða tænastuútboðið er so stórt. Og vit fara at gera tað, sum stendur í okkara valdi at nøkta tørvin hjá oljufeløgum, um oljuvinnan verður veruleiki. Men vit renna ikki avstað beinanvegin við spaka og sementi. Fyrst skulu vit vita, hvønn tørv feløgini hava, sigur Tórfinn Smith, sum heldur tað vera klókast at gera ítøkiligar íløgur so seint sum gjørligt til tess at sleppa undan at binda pening í óvirknar íløgur.

**Sund er egnað**

Úr øllum herðashornum hoyrast røddir, ið tala fyri júst sínum øki í sambandi við oljuvinnu. Firðir og sund verða dúgliga róst, og stórur dentur verður lagdur á at greiða frá, hví júst tann ella tann fjørðurin er best egnaður sum oljuhavn.

Men formaðurin í havnarnevndini í Havn heldur tað ikki vera nakra loynu, at økið á Sundi er væl egnað; serliga tí virksemið hjá oljufeløgunum á hendan hátt fer at vera so tætt við Tórshavn.

- Ein og hvør vinna vil virka har, ið best liggur fyri at vera. Ætlar tú tær t.d. at hava kiosk, so setir tú kioskina upp, har ið bestu útlitini eru fyri, at hon fer at bera seg, heldur Tórfinn fyri.

**Gott samband**

Sambært Tórfinn leggja myndugleikarnir í Havn stóra orku í at vera fyrireikaðir til oljuvinnuna. Kommunalu oyrini í høvuðsstaðnum standa á tambi, tá ið útlendsku oljufeløgini gera vart við tørv sín á tænastum.

Og Tórfinn Smith staðfestir, at Tórshavnar Býráð hevur gott samband við hesi feløg.



*Tórfinn Smith, formaður í Tórshavnar Havn*

# Klaverkonsert aftur við stummfilminum Jeanne d´Arc

Leygardagin og sunnudagin fer bretin Nigel Allcoat at hava konsertir í Føroyum. Byrjað verður leygarmorgunin við eini orgulmatiné í Christianskirkjuni í Klaksvík. Síðani skal hann spæla sunnumorgunin undir gudstænastuni í Havnar kirkju. Í kirkjunum spælir hann uttan stummfilmin. Tann stóra konsertin, klaverimprovisatiónin, har stummfilmurin samstundis verður vístur, verður sunnudagin kl. 16.00 í Norðurlandahúsinum.

Nigel Allcoat (f. 15/3 1950) er kendur sum ein av fremstu improvisatørum á orgul og klaver í Onglandi. Hann er m.a. útbúgvin á London Royal School of Church Music og á Conservatorio Santa Cecilia í Rom. Her var hann tann síðsti klavernæmingurin hjá tí kenda Germani. Seinni hevur hann eisini útbúgvið seg hjá Piet Kee, Anders Bondemann, Andre Isoir o. ø.

**Fjølbroyttur snillingur**

Sum 16 ára gamal spældi Nigel Allcoat t.d. klaverkonsertina hjá M. Tippets í Keypmannahavn. Seinni hevur hann luttikið í dómarapanelum undir kappingum, og undirvíst á masterclasses runt um í heiminum. Hann hevur havt eitt ótal av konsertum, sum mangan eisini eru útvarpaðar. Í 1988 bleiv hann settur í starv sum gestalærari í improvisatión við konservatoriið í Manchester. Hetta starv var nýtt — tað fyrsta av sínum slag - og serliga ætlað Nigel Allcoat. Hann hevur fingið sera lagaligar undirvísingar umstøður við universitetini í Oxford og Cambridge, umframt eitt gestaprofessorat við Konservatoriið fyri Kirkjutónleik í Dresden. Haraftrat undirvísir hann á International Summer Organ Conservatoire, sum liggur honum serliga nær at hjarta. Har samarbeiðir hann við m. a. Piet Kee, Ewald Koiman, Ulrik Spang-Hanssen.

Nigel Allcoat hevur fingið sera góð ummæli fyri sínar improvisatiónsfløgur. Ein kom út í 1993 og ein í 1996. Eisini hevur hann givið fløgu út við enskum og fronskum barokktónleiki. Hann hevur haraftrat framleitt 2 pedagogiskar fløgur um improvisatión og aðrar fløgur. Umframt improvisatión so er hann sera áhugaður í gomlum tónleiki og ljóðførum. Tískil hevur hann fingið eitt sera tætt samarbeiði við tann franska orgulsmiðin Bernhard Aubertin, sum serliga hevur lagt seg eftir at byggja barokkorgul.

Umframt at virka sum pedagogur, solistur og akkompagnatørur er hann 1. dirigentur hjá einum frálíkum kóri í Hinkley. Nigel Allcoat er sera fjølbroyttur og hevur eini serlig evni at "blíva eitt" við ljóðførið, sum hann spælir á, og at fáa sjálvt eitt lítið og einfalt orgul at ljóða upp til sítt besta.

**Jeanne d´Arc eitt stórverk í filmssøguni**

Filmurin "Jeanne d´Arc" er frá 1928. Tað er Carl Th. Dreyer, sum hevur gjørt filmin. Í søguligum samanhangi hevur hesin filmurin fingið umdømi, sum ein tann best spældi langi stummfilmurin nakrantíð. Tað framúrskarandi myndamálið bergtekur enn í dag hyggjaran, og staðfestir at filmurin er eitt stórverk í filmsøguni. Filmurin er um "prosessina" og avrættanina av tí ungu fronsku gentuni "Jeanne d´Arc". Við óteljandi nærmyndum skapar Dreyer eina skelkandi sálarliga nærveru. Einfalt kvinnuhatur og religøst hyklarí ger avrættanina av Jeanne (1412 — 1431) til eitt martyrium, tá hon ofrar seg fyri Gudi og Føðilandið. Longu sum barn hoyrdi bóndadóttirin Jeanne (Jomfrúgvin frá Orleans) røddir, sum bóðu hana um at gerast Guds amboð. Heim hennara var sora av bretum, men einki kundi vika hennara samband við Harran. Eftirtíðin hevur minst hana, sum tann sakleysa, ið var ofrað av sínum egnu í einum kyniskum valdsspæli. Tann viðurkendi enski pianisturin Nigel Allcoat er ein av teimum fáu, sum dugir listina til lítar at improvisera til ein stórfingnan film sum hendan.

Søgan um Jeanne d´Arc er eisini áhugaverd í dag. Nevnast kann, at júst í hesum døgum verur ein nýggjur filmur, sum er gjørdur í Hollywood, um Jeanne d´Arc vístur í filmshallum runt um í heiminum. Nú er so eisini møguleiki at síggja og uppliva tann gamla filmin.

Ferðin til Føroya hevur verið undir fyrireiking í yvir eitt ár. Í fjørsummar var danska Karin Jürgensen, sum er samskipari hjá Nigel Allcoat, í Føroyum og vitjaði ymsastaðni har møguleiki kundi verið at hildið konsert. Úrslitið er at Norðurlandahúsið hevur fyriskipa hesar tríggjar konsertirnar í Klaksvík og Havn. Nigel Allcoat hevur haft tilsvarandi klaverimprovisatiónir saman við filminum "Jeanne d´Arc" bæði í Danmark og Týsklandi.